# Andrias í Tarti 101 ár

Leygardagin 1. desember verður Andreas Andreassen úr Oyndarfirði 101 ár. Andrias er ein av mínum góðu gomlu vinum. Tað er ikki tí, at vit hava kenst so leingi. Vit hava vitað av hvørjum øðrum, men hann var 99 ár, áðrenn vit hittust fyrstu ferð.

Hevði varnast, at hesin gamli hevði eitt so ótrúligt minni um sína tíð, eisini sum fiskimaður. Hevði ringt til hann onkuntíð í samband við greinir í FF-blaðnum. Eg setti mær fyri, at øll henda vitan ikki mátti ikki fara fyri skjeyti. Avrátt varð tá við systurdótrina Freydis Poulsen at vit fóru til Oyndarfjarðar at fáa eitt prát við Andrias. Hetta var eisini ein rættilugur fongur. Andreas er føddur í 1906, og hann kundi ár fyri ár frá 1922, tá ið hann fór til skips fyrstu ferð, og 70 ár fram greiða frá sínum lívi á sjónum. Hann minstist framvegis manningina, hann var saman við 75 ár framman undan.



*Malfrid og Andrias á 100 ára føðingardegnum*

Ùrslitið av okkara samrøðum gjørdust ein greinarøð í átta pørtum, og eru hesar frásagnir eitt virðismikið íkast til okkara fiskimannasøgu.

Teir fyrstu fimm partarnir komu í FF-blaðið. Men tá tað varð steðgað, gjørdust teir seinastu tríggir partarnir byrjanin av Miðvikuni í Sosialinum.

Tey eru mong, sum hava tikið til hvussu áhugavert hetta tilfar var, og hvussu virðismikið tað var, at tað eydnist at fáa hetta tilfar niður á blað. Eina ferð kemur tað kanska eisini í bók.

Fyri meg sjálvan gjørdist tað eisini sera virðismikið, at eg kom at kenna Andrias. Hann er eitt serligt menniskja. Altíð positivur og við tí góða orðinum. Tey sum hava kent Andrias longri siga tað sama og taka til, hvussu raskur hann var og hvussu góður hann var at vera saman við til skips.

Andrias helt ein rimmar 100 ára føðingardag í Oyndarfirði, har tað vóru nógv fólk. Millum onnur var allur tjóðveldisflokkurin, sum Andrias hevur stuðlað, síðan flokkurin varð stovnaður. Tá lovaði Høgni Hoydal Andriasi, at tjóðveldið skuldi gerast verunleiki í hansara livitíð.

Hetta tyktist at vera nakað bjartskygt. Men Andrias heldur tørn enn, og er stórt sæð eins væl fyri sum tá. So hvør veit….

Tað er framvegis hugnaligt at koma inn á gólvið hjá honum og eins skilagóður er hann enn. Og hann kann framvegis staðfesta um ein ávisan túr, at hann var í 1933 og ikki í 1932!

Tað er ikki longur so sjáldsamt at fylla 100. Eitt sindur sjáldsamari er tó at fylla 101. Men tað man vera sera sjáldsamt at fylla 101 ár og framvegis hava sín hjúnaðarfelaga.

Men tað kann Andrias. Hann fekk sær nevniliga eina unga konu, Malfrid av Eiði, sum ikki varð fødd fyrr enn Andrias konfirmeraðist. Hon er tískil bert 86 ár. Tey búðu heima í Oyndarfirði til eftir at Andrias gjørdist 100 ár. Nú búgva tey á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík. Tey láta sera væl at at vera har.

Góði Andrias og eisini Malfrid. Hjartaliga tillukku við teimum 101 árunum.

**ó.**

# Marita er nýggjur stjóri

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur sett Maritu Rasmussen sum stjóra í Vinnuhúsinum**

STJÓRASKIFTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hon tekur við starvinum 1. januar, tá ið Jan Mortensen, sum er stjóri nú, fer í starv sum stjóri á Føroya Tele Samskifti.

Marita Rasmussen er 40 ára gomul og útbúgvin fiskivinnufrøðingur. Harafturat hevur hon tikið eina Master of Management við Robert Gordon University í Aberdeen.



*Vinnuhúsið gjørdi skjótt av og setti Maritu Rasmussen í stjórasessin eftir at Jan Mortensen gjørdi av at fara í annað starv*

Seinastu trý árini hevur hon verið samskipari í Vinnuhúsinum, og hon var eisini samskipari í Vinnuhúsinum eitt tvey ára skeið um aldaskifti. Av øðrum starvsroyndum kann nevnast, at hon hevur arbeitt við sølu og marknaðarføring av alifóðri fyri Fútaklett / EWOS, verið samskipari innan fiskivinnugransking, starvast sum ráðgevi og verið góðskuleiðari hjá Føroya Fiskavirking.

Harumframt hevur Marita siti í fleiri nevndum m.a. Føroya Grunninum, Landsbankanum og Vinnuframagrunninum.

Tá hon tekur við stjórastarvinum í Vinnuhúsinum, sigur hon seg úr nevndini í Føroya Grunninum, tí nevndir í privatu vinnuni ikki sampakka við stjórastarvi.

- Eg ivist ikki í, at vit hava sett ein persón við røttu eginleikunum til at røkja áhugamálini hjá vinnuni og at vera framsøgufólk fyri vinnusjónarmið, sigur Jóhan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag við heimasíðuna hjá vinnuhúsinum.

Lesið Sosialin - so eru tit við



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin